## Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
## Bygdarráðsfundur tann 28. juni 2017, kl. 19.00

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Laila Haldansen, Eyðun Hansen, Ingi Olsen, John Zachariassen, Herit Magnussen og Durita á Heygum
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 27**
Tilmæli frá Teknisku deild um innkomin tilboð at gera útstykkinga á Grótbrúgv.

P/F Articon, P/F J&K Petersen, Sp/f Konsax og Sp/f Kreton vóru bidnir um at geva tilboð upp á arbeiðið at gera útstykkingina á Grótbrúgv, og allir góvu tilboð. Tilboðini vóru latin upp 23. juni 2017.

Tilboðini vóru hesi:

| | |
|---|---|
| Articon | 18.358.010 kr |
| J&K Petersen | 21.891.968 kr |
| Konsax | 22.448.948 kr |
| Kreton | 21.856.280 kr |

HMP Consult hevur gjøgnumgingið tilboðini uppá útstykkingina.

Tilboðið hjá Articon áljóðandi kr. 18.358.010,00 er kr. 3.498.270,00 lægri enn næstlægsta tilboðið, ið er frá Kreton.

Mælt verður til at fara undir samráðingar við Articon um gerð av arbeiðinum.

**Viðv. 27**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 28**
Parkeringspláss á Heygum

**Viðv. 28**
Pauli T. Petersen og Jákup Durhuus greiddu frá uppskoti til alment parkeringspláss á Heygum.

Pauli T. Petersen, borgarstjóri, skjeyt upp at samtykkja at heimila umsitingini saman við teknisku nevnd at arbeiða víðari við málinum, og at málið verður tikið uppaftur á bygdarráðsfundinum í august.

Uppskotið var einmælt samtykt.

**Mál 29**
Serstaka byggisamtyktin fyri Grótbrúgv
J.nr. 01.02.05-1-17

Eftirhygging av serstøku byggisamtyktini fyri Grótbrúgv.

**Viðv. 29**
Pauli T. Petersen, borgarstjóri, mælir til, at samtykkja at broyta serstøka byggisamtyktina fyri Grótbúgv, soleiðis at avsneiðingarnar av byggiøkjunum nr. 3 og 4 millum hesar somu grundir verður tikið burtur úr samtyktini, soleiðis at byggjast kann eftir øllum 15 metrunum millum stykki 3 og 4.
Somuleiðis skal broytingin teknast í tilhoyrandi kort yvir byggisamtyktina og i tekstinum verður skoytt upp í: "..., tó undantikið fyri byggilinjurnar millum stykki 3 og 4, har loyvt er at byggja 15 m fram við grannamarki."

Uppskotið var einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.15

Sign.:

Pauli T. Petersen     Laila Haldansen     Eyðun Hansen

John Zachariassen     Ingi Olsen     Herit Magnussen     Durita á Heygum